# Sjóvarhiti og fiskasløg broytast

Norski Havgranskingarstovnurin sigur, at sjóvarhitin í Barentshavinum økist nógv, samstundis sum ísurin tiðnar og broytist í samljóð við økta hitan í sjónum. Aftrat hesum eru norðmenn vorðnir varugir við alt fleiri og fleiri fiskasløg, sum plagdu at vera óvanlig á norðraru hálvu. Herfyri bar norsk blað tíðindini um, at tveir útróðrarmenn soleiðis høvdu fingið 1400 pund av haváborrum í einum nótakasti.



# Sea Shephard bjargað 500 hvalum

Víðgongdi umhvørvisfelagsskapurin Sea Shephard sigur, at tey hava bjargað 500 hvalum við sínum átaki móti japansku hvalaveiðini. Japan hevur eina kvotu, sum er 9.000 hvalir hesa vertíðina. Tað hevur tó ikki gingið so væl hjá skipunum at veiða hval, tí mótmælisfólk hava roynt at forðað veiðini. Eitt nú hava mótmælisfólk blakað illa luktandi "bumbur" inn á dekkið á hvalaveiðiskipunum.

# Stelkur og Bakur inn at landa

**Gongst, sum ætlað, koma ísfiskatrolararnir Stelkur og Bakur helst inn at landa í morgin ella hósdagin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hendan vikan verður neyvan av teimum heilt stóru á landingarmiðstøðini hjá Beta í Saltangará.

Í dag landar eingin bátur, men í gjár vóru trý skip inni.

Leirvíkstrolararnir Stjørnan og Polarhav høvdu umleið 320.000 pund tilsamans, harav meginparturin var upsi, og garnabáturin Vesturland hevði eini 12.000 pund av havtasku.

Á Beta vænta tey, at ísfiskatrolararnir Stelkur og Bakur koma inn at landa í morgin ella hósdagin, meðan Heykur, Falkur, Rókur og Lerkur, sum allir eru til fiskiskap, neyvan koma innaftur fyrr enn fyrst í næstu viku.

### Sløk vika

Hugsandi er, at onkur garnabátur kanska eisini leggur veiðina upp seinni í vikuni.

- Hetta verður neyvan ein vika av teimum heilt stóru hjá okkum, sigur Dánjal Gaardlykke, sum starvast hjá landingarmiðstøðini.



*Stelkur og Bakur roynast drúgvir í fiskiskapi, og tá ið teir koma inn at landa í vikuni, er væntandi, at teir eru fullfermdir við upsa*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Th. Nygaard og Venus í Sørvági

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár landaðu línuskipini, Thomas Nygaard og Venus í Sørvági. Tað var landingarmiðstøðin, sum landaði skipini.

Sagt verður úr Sørvági, at Thomasa Nygaard hevði eini 45.000 pund og Venus eini 65.000 pund.

Tað var Faroe Seafood í Miðvági, sum keypti hýsuna hjá Venusi, meðan meginparturin av veiðini hjá Thomasi Nygaard fór av landinum.

Í Sørvági vænta tey, at línuskipið West Freeser kemur inn at landa mánadagin. Teir royna undir Íslandi, men enn er lítið frætt um, hvussu gingist hevur higartil á túrinum.

### Siglir við laksi

Úr Sørvági frættist, at djúpvatnstrolarin Roc Amadour nú fer annan túrin av landinum við ísaðum laksi. Hetta er feskur ísaður fiskur, sum Luna hevur selt keypara í útlandinum.

Roc Amadour fer til Hetlands við fiskinum.

Líkt er ikki til, at fiskaútflytarar eru serliga væl nøgdir við sjóvegis sambandið, sum Føroyar hava vit umheimin í løtuni.

# Svartkjafturin nærkast nú føroyskum havøki

**- Skipini eru í altjóða sjógvi, men vit vænta, at tey fyrstu koma í føroyskan sjógv um ikki leingi, siga tey á Havsbrún**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Svartkjaftaskipini royna í løtuni í altjóða sjógvi vestur úr Hebridunum*

Í vikuskiftinum landaðu tvey svartkjaftaskip í Fuglafirði. Hin fyrri var Christian í Grótinum, sum hevði 1915 tons – og hin seinni var Finnur Fríði, sum hevði 2465 tons. Bæði skipini vóru fullfermd.

Á Havsbrún siga tey, at Næraberg júst hevur landað í Vestmannaoyggjunum í Íslandi.

- Fiskiskapurin hevur verið misjavnur, og tí er heldur ikki so nógvur fiskur komin higar til lands seinastu tíðina.

Í Fuglafirði siga tey, at svartkjafturin í løtuni stendur vestanfyri Hebridurnar og gongur sína vanligu gongd spakuliga norðuryvir.

- Skipini eru í altjóða sjógvi, men vit vænta, at tey fyrstu skipini koma í føroyskan sjógv um ikki leingi.

Havsbrún tók fyrstu svartkjaftalastina undan Føroyum 9. apríl í fjør. Síðan var ein steðgur í, og síðan bóru skipini við aftur 12. apríl.

- Um 24. apríl kom líkasum øll veiðan úr føroyskum sjógvi, siga tey á Havsbrún.

Soleiðis, sum svartkjafturin hevur flutt seg norðureftir seinastu tíðina við, er líkt til, at gongdin í ár verður á leið hin sama sum seinasta ár.

Pelagiska skipið Jupiter hevði á seinasta túri trupulleikar við skrúvuni, og skipið er nú á beding á Skála, har brekið verður umvælt.